UTTAN ÚR HEIMI

## Danir hjálp úr Russlandi

Donsku ísbrótararnir eru ov smáir til at rudda slóð fyri teimum stóru russisku oljutangaskipunum, sum sigla ígjøgnum Stórabelti, og tí hava russar nú boðið sær til at lata ein stóran russiskan ísbrótara hava støð í Danmark, verður veturin kaldur.

Seinasta vetur vóru stórir trupulleikar við sjóferðsluni í Finsku Víkini, men eisini har ætla russar at forða fyri, at tað skal endurtaka seg í vetur. Teir hava tí flutt ein av sínum stóru ísbrótarum, "Kaptain Khlebnikov", úr Barentshavinum í Eystrasalt. Har skal hann hjálpa skipaferðsluni til og úr Sankta Pætursborg og oljuhavnini Primorsk.

Teir báðir størstu donsku ísbrótararnir, "Danbjørn" og "Isbjørn", eru seytjan metrar breiðir, men tað munar lítið, tí tangaskipini, sum sigla ígjøgnum Stórabelti, eru ofta bæði tvær og tríggjar ferðir breiðari.

## Hava smuglað 10.000 fólk

Løgreglurnar í Eysturríki og Ungarn hava avdúkað eitt brotsmannalið, sum eftir øllum at døma hevur smuglað umleið 10.000 fólk úr Kosovo til Norðurevropa.

Brotsmenninir vórðu tiknir fyri einari viku síðani. Flestu teirra eru úr Kosovo og øðrum pørtum av gamla Jugoslavia. Myndugleikarnir vilja vera við, at smuglararnir hava kravt 1500 evrur ella einar 12.000 krónur fyri hvørt fólk, sum teir hava smuglað úr Kosovo. Tað er kortini lítið samanborið við tað, sum fólk úr Afghanistan og Irak hava goldið fyri at sleppa til Norðurevropa. Hjá teimum hevur prísurin ofta ligið upp ímóti 100.000 krónum fyri hvønn.

Tey flestu, sum brotsmenninir hava smuglað úr Kosovo, eru flutt til Týsklands, Belgia og Niðurlond, men nøkur eru eisini endað í Norðurlondum. Eysturríkska løgreglan sigur seg hava prógv fyri, at smuglararnir hava ikki einans smuglað fólk, men eisini rúsevni.

## Reagan-sending bleiv broytt

Amerikanska sjónvarpsrásin CBS noyddist at broyta partar av einari sendirøð, sum rásin hevur gjørt um fyrrverandi forsetan Ronald Reagan, skrivar týska tíðindastovan DPA.

Sambært DPA var tað republikanski flokkurin hjá gamla forsetanum, sum kravdi, at partar av sendirøðini skuldu broytast. Í teimum báðum fyrstu sendingunum, sum eftir ætlanini skulu sendast tann 16. og 18. november, kravdi flokkurin ikki færri enn sekstan broytingar, og tað hevur gjørt, at CBS nú umhugsar at taka sendingarnar av skránni.

Eitt, sum republikanski flokkurin vildi hava burtur úr sendingini, var, tá Reagan einaferð segði, at fólk, sum hava fingið eyðkvæmi, hava livað í synd, og at tey tí eisini eiga at taka við syndarinnar løn, sum er deyðin.

Ronald Reagan var amerikanskur forseti frá 1980 til 1988. Seinastu árini hevur hann havt Alzheimersjúkuna.

## Løgnar bananir

Fleiri túsund bananir eru skolaðar upp á land í fjøruni næehrndis Ingå einar 60 kilometrar vestan fyri finska høvuðsstaðin Helsinki.

Ein talsmaður hjá finsku løgregluni sigur, at bananir vóru at síggja allastaðni í fjøruni. Hann heldur, at í hvussu er eini 40 stór tyssi vóru skolað upp á land við Ingå.

Myndugleikarnir halda, at bananirnar stava frá einum skipi. Teir hava eisini funnið olju í fjøruni har á leiðini. Talan er kortini ikki um olju, sum er vandamikil fyri umhvørvið, og nøgdin var heldur ikki so stór. Royndir eru tiknar av oljuni, og tær eru nú sendar einari rannsóknarstovu til kanningar.

# Skandinavisku londini fríhavn fyri yvirgangi

**Norðurlond, sum hava ein lagaligan innflytarapolitikk, eru fríhavnir hjá yvirgangsmonnum, sigur ein av heimsins fremstu serfrøðingunum í altjóða yvirgangi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Rohan Gunaratna er millum luttakararnar á einari stórari ráðstevnu, sum byrjaði í Keypmannahavn mánadagin. Evnið er altjóða yvirgangur. Dagliga arbeiðir hann sum leiðari á yvirgangsdeildini á einum trygdarstovni í Singapore, og hann verður mettur millum teir fremstu serfrøðingarnar á sínum øki.

- Tað er ein óreingiligur veruleiki, at Danmark hevur verið fríhavn hjá fleiri yvirgangsfelagsskapum. Eitt nú var Omar Abdel Rahman, sum er dømdur í sambandi við atsóknina at World Trade Center, í Danmark eitt tíðarskeið, sigur Rohan Gunaratna.

Spurdur, um Danmark eisini kann vera mál hjá altjóða yvirgangsfelagsskapum, svaraði serfrøðingurin ja. Einki land er undantikið hesari hóttanini, segði hann.

Rohan Gunaratna heldur, at amerikanararnir og altjóða samfelagið gjørdu eitt stórt mistak við at leggja seg eftir at gera av við Osama bin Laden og al-Qaeda aftan á atsóknina 11. september í 2001. Tí tað hevur bara havt við sær, at aðrir felagsskapir hava tikið seg upp.

- Sjálvt um al-Qaeda er viknaður nógv, eru fleiri limir í felagsskapinum fluttir til aðrar felagsskapir. Teir hava støð í Algeria, Tunis og Marokko. Teir gerast ein altsamt størri hóttan, og teir fara at fáa ein týðandi leiklut tey næstu fimm árini, sigur Gunaratna.

Hann heldur, at al-Qaeda hevur ikki so stóra ávirkan longur. Sambært Rohan Gunaratna eru millum 3.000 og 4.000 limir í felagsskapinum hjá bin Laden tiknir ella deyðir, og tí er felagsskapurin ikki longur førur fyri at fremja nakra stóra atsókn. Men aðrir eru komnir ístaðin, sigur hann og vísir á, at av fimm serliga blóðigum sjálvmorðsatsóknum í ár skipaði al-Qaeda bara fyri einari. Tað var ein í saudi-arabiska høvuðsstaðnum Riyadh.

# 170 druknaðu



*Myndugleikarnir í Indonesia halda, at eini 170 fólk doyðu, tá áarlop rakti eitt frítíðarstað sunnukvøldið. Minst fimm útlendingar eru millum tey deyðu, men enn eru næstan hundrað fólk ikki komin afturíaftur*

*Mynd: Reuters*

# Fimm ára gomul genta gav vinunum heroin

**Ein fimm ára gomul genta í niðurlendska býnum Hilversum hevði heroin við sær í skúla**

RÚSEVNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann fimm ára gamla gentan hevði funnið tablettirnar í kamarinum hjá eldra bróðurinum, og hon gjørdi av at taka tað við sær í skúla. Men ein ansin lærari varnaðist, hvat var á vási, og tað eydnaðist honum at fáa fatur á "gávunum" hjá gentuni, áðrenn børnini fingu roynt tablettirnar. Hann fekk løgregluni tær, og har vísti tað seg, at talan var um heroin, kokain og ecstasy.

Løgreglan í Hilversum hevur nú tikið tríggjar brøður hjá gentuni og mammu teirra. Teir tríggir brøðurnir, sum eru 16, 19 of 21 ára gamlir, sita í varðhaldi, men mamman varð latin leys.

Løgreglan sigur, at tann elsti av brøðrunum hevði nógv rúsevni við hús.



# Ingeborg sum ein millión

**Ingeborg Winther varð fyrrapartin týsdagin innskrivað sum ferðafólk nummar ein millión hjá Atlantsflogi**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Ingeborg Winther gjørdist ferðafólk nummar ein millión hjá Atlantsflogi. Starvsfólkið á ferðini ynskti henni tillukku saman við leiðsluni í flogfelagnum*

*Mynd: Jens Krisitan Vang*

**Flogvøllurin:** Ingeborg Winther gjørdist feðrafólk nummar ein millión, sum Atlantsflog flutti, síðan felagið varð stovnað fyri skjótt 16 árum síðan.

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag visti av ongum, tá hon varð tikin burturfrá eftir at hava skrivað seg inn við diskin hja Atlantsflogi á flogvøllinum týsdagin. Fleiri tíðindafólk vóru á staðnum, og nógvar myndir vórðu tiknar av ferðafólkinum. Fólk frætti, hvat fór at henda, men eingin visti, hvør viðkomandi var, sum gjørdist nummar ein millión hjá føroyska flogfelagnum

Magni Arge, stjóri hjá Atlantsflogi, handaði Ingeborg Winther eitt gávukort, sum var ein ferðaseðil fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantsflogi umframt eitt blómutyssi.

Ingeborg Winther takkaði fyri og helt, at tað fór helst ikki at verða nakar frá arbeiðsgevarasíðuni, sum slapp at ferðast við henni. Suðuri í Vági sat ein persónur, sum hon sjálv kundi hugsað sær at farið at ferðast saman við, segði hon, og eingin ivaðist í, at tað var mannin, Andrew, hon hugsaði um.

Blómutyssið bað hon starvsfólk hjá Atlantsflogi bera Ellisheiminum í Miðvági sum eina heilsu.

Tað tók Atlantsflogi nakað meira enn 15 ár at náa ferðafólki nummar eina millión, sigur Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá felagnum. Fyrstu hálvu milliónina tók tað tíggju ár at náa, og tað seinnu hálvu brúktu tey helvtina til, sigur hann.

Hann sigur, at útlitiini hjá Atlantsflogi eru hampilig í løtuni. Tey vænta ein vøkstur í ferðafókatalinum í ár í mun til í fjør.

Jólaferðslan er løgd til rættis, og hon sær út til at fara at verða nógv. Tíggju eykaflogfør eru løgd á ferðaætlanina, greiðir hann frá.

Eitt nýtt átak byrjar eisini nú, sum tey kalla at ferðast á jólum. Talan er um at fáa fólk at ferðast úr Føroyum til eitt nú Keypmannahavnar, Billund, Aberdeen og Oslo um jólini. Flogførini koma full heim við føroyingum, sum koma hendanveg at halda jól. Og roynt verður so at fáa fólk at brúka setrini hinvegin eisini, sigur Kent Christensen.

Jólaflúgvingin byrjar 18. december og heldur fram til tollaksmessudag. Beint eftir nýggjar plaga fólk so at fara avstað aftur. Vanliga er nógva ferðslan liðug um trettanda ella so.

# Kurvin full av pynti

**Mánadagin læt nýggjur handil við prýðis- og gávulutum upp í Sørvági. Handilin eitur Kurvin**

HANDILSVINNA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Nýggjur handil læt upp i Sørvági mánadagin. Tað er Eyðvør Petersen, sum fyrr hevur arbeitt í blómuhandli, sum lat upp engan handil við prýðislutum og ymsum gávulutum.

Tað er ljóst inni. Vindeyguni eru stór, og veggirnir ljósir. Nógv av tí ið inni er, er í ljósum litum. Ljóst blátt og reytt, og eisini nakað væl av hvítum.

Og so eru allar jólavørurnar savnaðar á einum staði. Jólamenn og einglar. Pynt av ymsum slagi. Alt ið minnir á, at nú nærkast jólini, hóast tað í grundini kemur eitt sindur óvart á, at møta slíkari rúgvu nú longu beint eftir alla halganna.

Eyðvør Petersen greiðir frá, at tá hon arbeiddi í blómuhandlinum hjá Trónd Hansen í Havn, gekk hon ofta og hugsaði um møguleikan við egnum handli við slíkum vørum, sum hon nú er farin at selja í Sørvági.

Tá handlini, hon arbeiddi í í Havn, so lat aftur, gjørdi hon álvara av og fór undir at fyrireika hendan handilin, hon nú hevur latið upp í Sørvági her hon býr.

Flestu vørurunar eru innfluttar, greiðir hon frá. Men nakað er kortini av heimagjørdum.

Tað eru mest dekoratiónir av ymsum sløgum, sum hin ger sjálv, sigur hon. Her metir hon, at royndirnar frá tíðini hjá Trónd Hansen eiga at fara at síggjast afur. Hendan dagin, latið varð upp, vóru eisini nakrar føroyska ullvørur at síggja í handlinum. Men tað fer ikki at verða í framtíðini, sigur hon. Hetta er bara nakað, sum hon royndi at selja fyri onkran annan, ið hevði nakað av slíkum heimabundnum liggjandi.



*Eyðvør Petersen, sum fyrr hevur arbeitt í blómuhandli, hevur latið upp nýggjan handil í Sørvági, har hon fer at selja prýðis- og gávulutir*

*Mynd: Edvard Joensen*

Eyðvør Petersen, sum einsamøll stendur fyri handlinum, sigur, at hon ikki hevur nakað ávíst merki av vørum, sum hon selur. Tað verður, sum tað kemur, sigur hon.

At hon letur slíkan handil upp í Sørvági, kemst av, sigur hon, at hon hevur hildið, at hann hevur manglað í oynni. Ein gávubúð erá flogvøllinum, men har verða aðrar vørur seldar enn tær, Kurvin fer at selja, sigur Eyðvør Petersen.

At handilin júst liggur i Sørvági og ikki einastaðni millum flogvøllin og Vágatunnilin, kemst av, at hon sjálv býr í Sørvági, sigur Eyðvør Petersen, sum ásannar, at tað hevði verið høgligari hjá frammandafólki, sum ferðast til og frá flogvøllinum at støðga á á vegnum.

– Men nú eri eg her við tí fyrsta handlinum av hesum slagnum í oynni, og so má eg bara gera so mikið meira við at fáa fólk at koma oman til Sørvágs at keypa frá mær, sigur ein vónrík Eyðvør Petersen, sum fegnast um allar tær heilsurnar hon hevur fingið, nú upp er latið.